# Summarkapping 2007

# Legoland – eitt altjóða ferðamál



*Nógvir føroyingar vitja á hvørjum ári Legoland. Hesin drongurin av Skála hugnaði sær í leikalundini í hvítusunnuvikuni*

**Á hvørjum ári vitja meiri enn hálv onnur millión fólk Legoland í Billund**

**BILLUND**
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*

Næstan ár eru 40 ár, síðani leiðslan á leikuverksmiðjuni LEGO gjørdi av at gera eina serliga leikalund í Billund. Úrslitið varð tað væl kenda Legoland, sum í dag verður roknað sum eitt tað besta og mest livandi tekinið um, hvat skapanarevni og hugflog kunnu kasta av sær.

Upp ígjøgnum tey 40 árini er leikalundin bygd út fleiri ferðir - bæði eftir tørvi og við tí nýggja, sum tíðin og hugflogið hava evnað til. So í dag er Legoland ikki bara ein lund, men eitt heilt land við alskyns tilboðum og avbjóðingum, har dentur verður lagdur á, at tann einstaki skal medvirka. Har eru tokbreytir, bóndagarðar, sjúkrahús og annað - alt bygt úr teimum kendu LEGO-kubbunum. Tað sigur ikki so lítið, at meiri enn 50 milliónir kubbar eru brúktir til Legoland, soleiðis sum vit kenna tað í dag.

Tað varði ikki leingi, til umheimurin fekk eyga á leikalundina í Billund, og skjótt vaks talið á útlendskum gestum nógv. Í dag vitja meiri enn hálv onnur millión fólk Legoland á hvørjum ári, og leikalundin er sostatt tað størsta einstaka ferðamálið í Jyllandi.

Tann stóri útlendski áhugin fyri Legolandi hevði sum frá leið við sær, at fyritøkan fekk sær tilsvarandi leikalundir í Týsklandi, Bretlandi og í USA, og ætlanin er at byggja næstan tjúgu afturat.

Upprunaliga átti Kirk Christensen-ættin Legoland, men í dag er tað altjóða fyritøkan Merlin Entertainment Group, sum eigur Legoland-leikalundirnar.



*Puntur nummar 18 av 23*




www.sansir.fo

Uttan mun til hvar, og hvussu leiðin gongur, er tað umráðandi at fara tryggur avstað. Byrja ferðina hjá okkum, soleiðis at tú fært allan tín tørv nøktaðan og tryggur kanst njóta ferðina.

Kongabrúgvin, Postboks 329, 110 Tórshavn, Tel 345600,
Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari